


# Dong fyllir brunnin hjá Goldman Sachs

**Jógvan Hugo Gardar**

29.10.2014 - 10:31

Oljan.fo

Amerikanski íløgubankin Goldman Sachs sær út til at hava gjært eina stak góða íløgu í Dong. Hetta farna hálva árið hevur partabrævið økt í virði og parturin hjá Goldman Sachs er øktur í virði við minst einari milliard krónum, skrivar finans.dk.

Virði á Dong er í dag mett til 52 milliardir krónur, og tað eru sjey milliardir meir enn tá Goldman Sachs legði átta milliardir krónur á borði fyri 18 prosent av partabrøvunum. Partabrævavirðið er økt hesar mánaðirnar, og í løtuni er parturin hjá Goldman Sachs 1,2 milliardir meir verdur enn tá hann bleiv keyptur.

Finans.dk skrivar at um Dong við aðalstjóranum Henrik Poulsen á odda halda ferðini, so kann tann góða milliardin amerikanarnair hava vunnið hetta hálva árið um eitt ár vera økt til nærri 2,5 milliardir